Jóhannis Joensen
Bárður á Steig Nielsen
Jacob Vestergaard
Árni M. Dam
løgtingsmenn

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
(Flyting av fiskidøgum til árið eftir verður víðkað til eisini at fevna um bólk 5)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. mai 2025 verður í § 19, stk. 4 "§ 18, stk. 1, nr. 1-4" broytt til: "§ 18, stk. 1, nr. 1-5".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Bólkarnir av fiskiførum undir føroyskum flaggi á botnfiskaveiðu í føroyskum sjógvi, tó Føroyabanki undantikin, eru ásettir í § 18, stk. 1, nr. 1-5 í sjófeingislógini. Við heimild í § 18, stk. 1 ásetur landsstýrismaðurin í kunngerð fiskidagatalið fyri hvørt fiskiár fyri hesar bólkarnar.

Felags fyri bólkarnar í § 18, stk. 1, nr. 1-4 (bólkur 2, 3, 4 og 4 T) er, at óbrúktir fiskidagar kunnu flytast til árið eftir við heimild í § 19, stk. 4 í lógini. Bólkur 5 er tó ikki fevndur av hesi áseting. Hetta kann tykjast órímiligt, tí ofta kemur fyri, at útróðrarbátarnir ikki klára at brúka allar fiskidagarnar í einum fiskiári.

Bólkur 5 fevnir um fullriknar (A) og ikki fullriknar (B) útróðrarbátar. Tað kemur fyri ferð eftir ferð, at útróðrarbátar í bólki 5 B mangla fiskidagar, áðrenn árið er úti. Hesin bólkur av útróðrarbátum eru ofta bátar, sum í frítíðini fiska eitt sindur til uppihald ella sum hjávinnu og bátar, sum fullriknir fiska fyri at røkka einum a-loyvi. Talan er ofta um pensjónistar, skúlanæmingar, men eisini eru fullriknir bátar við ungum kreftum, sum velja útróður sum livibreyð. Summi ár er góður fiskiskapur, og prísurin er góður, meðan onnur ár er fiskiskapurin ikki líka góður, og prísurin møguliga heldur ikki. Eitt nú vórðu í 2024 ásettir 7.565 fiskidagar, og einans 4.523 dagar vórðu brúktir. Sostatt vóru góðir 3.000 óbrúktir fiskidagar, ið kundu verið fluttir til árið eftir.

Undir tingviðgerðini av løgtingsmáli nr. 28/2025, uppskot til samtyktar um økt fiskidagatal í bólki 5 B kom fram, at landsstýrismaðurin ikki hevur ætlanir um at broyta siðvenjuna í mun til ásetan av fiskidøgum.

Tí verður mett neyðugt, at sjófeingislógin verður broytt soleiðis, at bólkur 5 eisini verður fevndur av heimildini hjá landsstýrismanninum at flyta fiskadagar til árið eftir. Harvið verður bólkur 5 javnsettur við hinar bólkarnar.

Viðmerkjast skal, at bæði ásetan og flytan av fiskidøgum verður gjørt í kunngerð, fyri árið 2025 í kunngerð nr. 155 frá 21. desember 2024 um fiskidagar í føroyskum sjógvi í 2025. Um sjófeingislógin verður broytt, soleiðis at óbrúktir fiskidagar í bólki 5 kunnu flytast til árið eftir, er eisini neyðugt hjá landsstýrismanninum at tillaga kunngerð um fiskidagar í føroyskum sjógvi fyri viðkomandi ár.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Sambært broytingini verður bólkur 5 javnsettur við hinar bólkarnar í § 18, stk. 1 um at fiskidagar kunnu flytast til árið eftir.

Velur landsstýrismaðurin at flyta fiskidagar í bólki 5 til árið eftir, so skal tillutanin av fiskidøgum til fullriknar og ikki fullriknar útróðrarbátar gerast eftir tørvi á fiskidøgum.

Til § 2
Gildiskoma.

Á Løgtingi, 11. november 2025

Jóhannis Joensen

Bárður á Steig Nielsen | Jacob Vestergaard | Árni M. Dam